VIÐMERKINGAR

# Tey eldru í Klaksvík skulu ikki bíða

EYÐGUNN SAMUELSEN
Býráðslimur í Klaksvík



**– Vit í minnilutanum eru als ikki samd við meirilutanum í Klaksvíkar býráð um, at kommunan ikki skal gera íløgu á røktarheimsøkinum nógvu komandi árini, sigur Eyðgunn Samuelsen. Hon fer at virka fyri, at so verður kortini**

Steinbjørn Jacobsen, borgmeistari í Klaksvík, greiður frá í fjølmiðlunum, at hóast stóran tørv á røktarheimsplássum, so fer Klaksvíkar Kommuna ikki at søkja landið um stuðul til at byggja røktarheim, tí kommunan fer onga íløgu at gera á hesum øki tey nógvu komandi árini.

Hesum eru vit í minnilutanum als ikki samd í, og tí legði undirritaða uppskot fyri sosialu nevnd um, at Klaksvíkar Kommuna skal søkja stuðul til røktarheimsbygging sambært tørvinum á eldrarøkt í Klaksvík, og var hetta uppskot samtykt í sosialu nevnd.

Bíðilistin til røktarpláss í Klaksvík er umleið 89 fólk, harav 10-15 eru akutt. Skulu vit loysa tørvin í Klaksvík á ein virðiligan hátt, so eiga vit at niðurleggja Sambýlið í Bøgøtu, ið hevur 10 pláss, og vit eiga eisini at »niðurleggja« tey búpláss á Røktarheiminum, har tvey búfólk búgva saman, hetta hoyrir ikki heima í 2006.

Sambært fakfólkum á økinum, so vil eitt røktarheim við 34 plássum nøkta tørvin her norði langt fram í tíðina, og tá er afturlating av sambýlinum í Bøgøtu og dupultplássini á røktarheiminum íroknað. Tíðin er ikki til at velja bíligar loysnir, so sum sambýli, tí røktartørvurin er av slíkum slag, at sambýli ikki er egnað til endamálið. Fáa vit eitt røktarheim til 34 brúkarar, so skuldi røkst fyri, at Sambýlið undir Heygnum kom at virka eftir endamálinum, sum eitt veruligt sambýli.

Klaksvíkar Kommuna hevur og fer at gera stórar íløgur komandi árini, men at taka tey eldru burturúr og siga, at tey mugu bíða, eri eg als ikki samd í. Hvar og nær vit gera íløgurnar er ein spurningur um fíggjarorku og raðfesting. At kommunan ikki kann fara undir røktarheimsbygging í 2006 - 2007 eri eg greið yvir. Tann einasta íløgan á sosiala økinum í dag er barnagarðurin í Traðargøtu, og tá hann er liðugur væntandi tíðliga í 2007, so eigur at vera pláss fyri minst einari íløgu innan hetta øki, og tað eigur at vera eitt røktarheim. Verður hetta ikki gjørt, so hevur meirilutin í Klaksvíkar Býráð, eftir mínum tykki, lagt alt sum eitur sosialpolitikk á hyllina.

Umsóknirnar sum í hesum døgum fara til landið um stuðul eru partur av eini trý ára ætlan, tað vil siga tær ganga heilt fram til 2009, og tí má Klaksvíkin vera við nú.

Verður henda ætlan veruleiki, so kann Klaksvíkin eisini vera millum fremstu kommunir í landinum, tá ið tað kemur til eldraøkið, og at so verður vil undirritaða leggja alla orku í at virka fyri.

*eydgunn.samuelsen@skulin.fo*

# Mugu fyribyrgja fuglakrími

MARJUS DAM
Løgtingsmaður



**– Fer Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, at koma við tilmæli um, hvussu føroyingar skulu bera seg at fyri at fyribyrjga fuglakrími, spyrj Marjus Dam**

Seinastu tíðina hava fleiri tilburðir av fuglainfluensu verið í Turkalandi. Tað óhugnaliga er, at hendan herviliga sjúka nærkast okkum í stórum.

Várið nærkast, og hópur av flytifugli kemur til landið. Við hesum er eisini vandi fyri, at fuglakrím kann koma til landið.

Eg fari tí at spyrja Hans Paula Strøm, landstýrismann í heilsumálum, um hann hevur ella fer at koma við tilmæli um, hvussu føroyingar skulu bera seg at fyri at fyribyrgja at hendan sjúka ger innrás í Føroyum?

*Hvussu við heimafugli?*
*Hvussu við flytifugli?*
*Hvussu við fuglaveiði?*
*Hvussu við innflutningi av flogfenaði (deyðum /livandi)*
*Hvussu skulu føroyinga fyrihalda seg?*
*Hvørji eru symptomini uppá sjúkuna og hvussu skal berast at, um illgruni er um sjúkuna*
*Hvørjir viðgerðarmøguleikar eru?*

Alneyðugt er, at vit fyrireika okkum væl, og at lógir, kunngerðir og kunning verða gjørdar, soleiðis at vit forða mest møguligt fyri hesi sjúku í Føroyum.

Sjónarmið:

# Sjálvsavgerðarrætturin er okkara!

JÓANNES EIDESGAARD
Løgmaður



**Í sambandi við fráboðanina til ST um víðkaðu heimildir Føroya í uttanríkispolitikki, viðurkenna danir fyri fyri fyrstu ferð at føroyingar hava sjálvsavgerðarrætt sambært altjóðarætti. Løgfrøðiliga broytir hetta møguliga ikki okkara støðu munandi, men politiskt hevur hetta stóran týdning**

Danir hava síðani 1948 sent fleiri fráboðanir til ST, har teir eisini upplýsa um rættarstøðu Føroya – millum annað varð hetta gjørt í 1998. Hetta ger Danmark sum limaland í ST, og fráboðanirnar verða vanliga ikki politiskt viðgjørdar ella sendar Løgtinginum. Í hesum umfari boðaðu danir ST frá, at Føroyar við uttanríkislógini nú hava víðkaðar heimildir á uttanríkisøkinum. Í fráboðanini verða føroyingar fyri fyrstu ferð nevnd eitt fólk við sjálvsavgerðarrætti í altjóðarætti. Hetta er nakað danir ongantíð hava vilja gjørt áður!

## Ógreitt hugtak, greið støða

Teoretiskt og løgfrøðiliga er sjálvsagerðarrættur eitt hugtak, sum ymiskar metanir eru um. Og serfrøðingarnir geva ikki eitt greitt svar, hvat hesin sjálvsavgerðarrættur merkir.

Persónliga eri eg samdur við Halgir Winther Poulsen, tá hann sigur, at lykilin til loysingina liggur hvørki í New York ella á Christiansborg, men í Føroyum. Mín innasta sannføring er, at hava vit ein dag ein greiðan meiriluta fyri loysing, so fáa vit loysing – eisini hóast vit mugu boða dønum frá avgerð okkara og samráðast við danir um ymisk viðurskifti í sambandi við loysingina.

## Orðið fangar

Orðingarnar um sjálvsavgerðarætt føroyinga sambært altjóðarætti standa eisini í felagslýsingini um yvirtøkulógina, sum varð undirskrivað 4. apríl í fjør. Eisini tá varð kjakast um, hvørt sjálvsavgerðarrætturin hevur nakran týdning – um hetta er tann ytri, ella innari sjálvsavgerðarrætturin. Professarin í fólkarætti og fyrrverandi danskur løgmálaráðharri, Ole Espersen, segði tá í samrøðu við ÚF: *"Når det siges på denne måde her, er det vanskeligt at forestille sig, at nogen dansk regering på noget tidspunkt vil nægte Færøerne fuld selvstændighed, hvis Færøerne ønsker det."*

Eisini danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen gjørdi tá alment púra greitt, at føroyingar fáa loysing, vil føroyska fólkið tað. Við hesum endurtók hann orðini hjá undanmanni sínum Poul Nyrup Rasmussen.

Umframt at danir nú í altjóðahøpi nevna okkum sum eitt fólk við sjálvsavgerðarætti sambært altjóðarætti, hevur danska fólkatingið eisini niðurfelt í fólkatingssamtykt at føroyingar fáa loysing, vilja vit tað. Skuldi tað komið til skarpskeringar ein dag, tí føroyska fólkið ynskir seg úr ríkisfelagsskapinum, so er tað í roynd og veru ómøguligt hjá dønum at bakka ella forða hesum.

Tí hava hesar politisku útsagnir stórt virði - ikki minst tá altjóðasamfelagið skal meta um kravið hjá føroyingum. So hóast ein tekur ta støðu, at støða okkara løgfrøðiliga ikki er nógv broytt, so er eingin ivi um, at tað hevur stóra týdning, at danir skriva svart uppá hvítt og siga alment, so allur heimurin hoyrir tað at føroyingar ráða sær sjálvum, tá tað snýr seg um ríkisrættarligu framtíð okkara.

## Støða okkara styrkt

Íslendski serfrøðingurin í altjóðarætti Gudmundur Alfredsson sigur, at tað er positivt, at føroyingar í fráboðanini verða nevnd eitt fólk, sum hevur sjálvsavgerðarætt sambært altjóðarætti. Síðani sigur professarin, at tað er sera óheppið, tá danir ferð eftir ferð senda fráboðanir til ST, har nevnt verður, at Føroyar eru partar av danska ríkinum, og harvið undir grundlógini.

Men júst tí at danir javnan senda fráboðanir um støðu Føroya til ST, er tað so umráðandi, at føroyingar hesuferð verða nevnd eitt fólk við sjálvsavgerðarætti sambært altjóðarætti.

## Føroyar vegna Føroyar

Uttanríkislógin gevur okkum møguleika at gerast meira sjónlig í uttanríkispolitikki. Onnur lond fara við tíðini ikki longur at ivast í, at Føroyar – hóast partur av ríkisfelagsskapi – er ein sjálvstøðugur partur. Í øllum yvirtiknum málum, kann løgmaður nú skriva undir vegna Føroyar – sum Føroyar.

Besta dømi um hetta eru avtalurnar, vit júst hava gjørt við ES, Sveits, Norra og Ísland í sambandi við kumuleringsskipanina. Við heimild frá løgmanni hevur okkara sendimaður í Brússel undirritað hesar týdningarmiklu avtalur. Tí eftir uttanríkislógini skulu altjóðarættarligir sáttmálar, ið viðvíkja yvirtiknum málsøkjum, undirritast av løgmanni ella øðrum, ið hann gevur fulltrú, og hendan *undirskriftin verður altjóðarættarliga bindandi.*

Áðrenn vit fingu uttanríkislógina hevði tað verið danski uttanríkisráðharrin, ella annar við fulltrú frá honum, sum hevði undirritað bindandi fyri Danmarkar ríki og fevnandi um Føroyar. Løgmaður hevði tá møguleika at medundirrita – uttan altjóðarættarligt gildi. Áðrenn uttanríkispolitisku lógina kundu vit heldur ikki fara undir samráðingar uttan loyvi frá dønum. Hetta kunnu vit nú!

Tað er bert í sera fáum og heilt serligum málum, har talan er um sáttmálar millum ríkir, at Føroyar koma at undirrita sum "The kingdom of Denmark in respect of the Faroes" ella "Kongsríki Danmarkar viðvíkjandi Føroyum".

Avmarkingarnar í uttanríkislógini liggja í, at vit ikki kunnu upptraðka sum sjálvstøðugur partur í øllum millumtjóða felagsskapum – tað merkir, har bert sjálvstøðug lond eru limir – um Danmark frammanundan er limur. Hetta kundu vit heldur ikki áðrenn, tí vit ikki eru sjálvstøðug tjóð.

## Saman at standa

Fólkarættarserfrøðinginum Frederik Harhoff sigur við Dimmalætting, at: *"Við uttanríkislógini hava Føroyar fingið so víðkaða heimild, sum til ber uttan at melda seg úr ríkisfelagsskapinum og harvið loysa".* Hesa tulking kunnu vit kjakast um. Men veruleikin er jú, at so leingi vit eru í ríkisfelagsskapinum, er uttanríkismál danskt málsøki. Vit kunnu ikki, sum partur av danska ríkinum gera, sum okkum listir. Men uttanríkislógin gevur nakrar møguleikar, og tá ræður um avtalur á økjum, vit hava yvirtikið, nýtist okkum ikki longur at spyrja um loyvi.

Eg trúgvi, at stórur meiriluti at Føroya fólki vil, at vit gerast alt meira sjálvbjargin og taka ábyrgdina av landi okkara. Tað er her heima slagið skal vinnast fyri størri sjálvræði . Tað er her heima, vit mugu fyrireika okkum til at klára okkum uttan danska ríkisveiting og ikki nýta orkuna til at stríðast við danir um eitt mál, har vit standa sterk – og nú eitt vet sterkari enn áður.

*info@tinganes.fo*